# Schrøder vil hava ferð á

Júst sum ein nýggj frágreiðing staðfestir, at tað gongur ongan veg við at bøta um kappingarførið hjá ES, er týska stjórnin farin undir at fyrireika eina ætlan, sum í hvussu er skal fáa gongd á týska búskapin.

Í einari grein í blaðnum Handelsblatt skrivar Gerhard Schrøder, kanslari, at stjórnin fer at halda fast um ætlanina at endurnýggja tann týska arbeiðsmarknaðin innan 2010. Sjálvur heldur hann, at tað eru nógvir ónýttir møguleikar innan tænastuvinnuna í Týsklandi, og at fleiri milliónir fyritøkur kunnu fáa gagn av einari nýggjari skipan fyri arbeiðsmarknaðin,.

Eitt annað, sum sambært kanslaranum er avgerandi fyri Týskland og alt ES, er, at tað verður frítt hjá fyritøkum at velja, hvaðani tær keypa el og gass. Tað fer at økja kappingina tvørtur um landamarkini, eins og tað fer at skerja útreiðslurnar og medvirka til vøkstur, skrivar kanslarin.

Í næsta mánað hittast ríkis- og stjórnarleiðararnir í ES, og tá ætlar Schrøder at kunna teir um sínar ætlanir.

# Arbeiðsleys skulu umvæla kloakkir

Felagið hjá donsku bygivinnuni mælir myndugleikunum til at lata tey arbeiðsleysu umvæla tær donsku kloakkirnar, sum treingja til ábøtur.

Ein kanning hevur avdúkað, at umleið 9.000 kilometrar av tí almenna danska kloakkkervinum er í so ringum standi, at tað er neyðugt við ábótum alt fyri eitt. Umhvørvismyndugleikarnir hava víst á, at tær vánaligu kloakkirnar eru ein meginorsøk til, at tað eru nógv fleiri rottur í Danmark nú enn fyri bara fáum árum síðani. Sambært umhvørvismyndugleikunum eru fráboðaninar um rottur øktar næstan 50 prosent tey seinastu árini.

Nú mælir felagið hjá byggivinnunmi politikarunum til at lata tey arbeiðsleysu umvæla kloakkirnar. Felagið sigur, at tey bæði seinastu árini hava umleið 2.000 fólk í byggivinnuni mist arbeiðið, og at kloakkumvælingarnar kundu útvegað umleið 3.000 nýggj arbeiðspláss.

Sosialdemokratarnir og Sosialistiski Fólkaflokkurin hava boðað frá, at teir taka undir við hugsotinum hjá byggivinnuni, og Connie Hedegaard, umhvørvismálaráðhari, sigur, at hon er sinnað at kanna málið næri.

# Skiparin hevði kenning

Mánakvøldið tók norska løgreglan skiparan á einum Liberia-tangaskipi, tí manningin hevði boðað frá, at hann var drukkin.

»MCT Alioth« var á veg til Mongstad eftir olju, tá løgreglan fekk at vita, at russiski skiparin hevði kenning. Skipið fekk boð um at leggja stilt og at kasta akker. Síðani fór løgreglan umborð, og kanningar hjá læknanum í landi vístu, at skiparin hevði 2,02 promillu av alkoholi í blóðinum. Tann 50 ára gamli skiparin fekk 5.000 krónur í bót, og hann tók við sektini beinanvegin.

Løgregluovastin í Lindås, Einar Vatne, sigur við Bergens Tidende, at eftir hansara tykki er revsingin í tílíkum førum alt ov lítil.

– Skal ein bussførari umborð á eina ferju, skal hann hava verið edrúur í minst átta tímar, áðrenn hann setir seg við róðrið. Soleiðis er ikki við skiparanum á ferjuni. Ert tú skipari, kanst tú hava rættiliga fitt av alkoholi í blóðinum, uttan at tað er revsivert, sigur Einar Vatne við blaðið.

## UTTAN ÚR HEIMI

# Eingin nýggj ES-nevnd enn



*Rocco Buttiglione og Manuel Barroso*

**Evropatingið hótti við at kolldøma ta nýggju E-nevndina. Tað fekk formannin at taka uppskotið aftur**

ES
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Fyrrapartin í gjár Evropatingið atkvøða um nýggju ES-nevndina. Upp undir atkvøðugreiðsluna var stórur spenningur í Strasbourg, tí ein meiriluti í tinginum hevði gjørt av at vraka nevndina, tí ein av kommiserunum, italiumaðurin Rocco Buttiglione, hevur tosað niðursetandi um kvinnur og samkynd.

Formaðurin í nýggju nevndini, fyrverandi portugisiski forsætisráðharrin Jose Manuel Barroso, royndi til tað seinasta at fáa undirtøku fyri nevndini, men til fánýtis. Tí noyddist hann í síðstu løtu at kunngera, at hann tók uppskotið um nevndina aftur.

Tað merkir, at fráfarandi nevndin hjá Romano Prodi verður sitandi fyribils.

Eygleiðarar í Strasbourg søgdu í gjár, at Barroso verður noyddur at umskipa ta nýggju nevndina, skal hann fáa hana góðkenda í tinginum. Ein loysn hevði verið, at Rocco Buttiglione, tekur seg aftur, men italska blaðið La Stampa skrivaði í gjár, at tað vil hann ikki.

Ætlanin var, at nýggja ES-nevndin skuldi taka við tann 1. november.

# Er við barn og skal steinast til deyða

**Ein dómstólur í Nigeria hevur gjørt av, at tann 18 ára gamla Hajara Ibrahim skal steinast til deyða, tí hon er við barn, sjálvt um hon ikki er gift**

REVSING
*Árni Joenhsen:*
*fartekst@mail.dk*

Hajara Ibrahim er muslimur. Foreldrini játtaðu at lata ein mann fáa hana til konu, og Hajara fór at búgva hjá manninum, sum býr meiri enn 200 kilometrar frá heimbygd hennara. Rættiliga skjótt gjørdist hon við barn, men tá sýtti maðurin fyri at gifta seg við henni, tí hann vildi vera við, at hann átti ikki barnið.

Nú hevur ein islamskur dómstólur gjørt av, at Hajara skal steinast til deyða.

– Eg svørji við Koranina, at eg havi ikki verið við nøkrum øðrum manni enn Dauda. Eg var gift einum øðrum manni, men so møtti eg Dauda. Hjúnarlag mítt bleiv upployst, og Dauda lovaði at gifta seg við mær. Tí lat eg hann koma til mín, sigur Hajara Ibrahim við tíðindastovuna AP.

Mannarættindafelagsskapurin Baobab er farin upp í mál hennara. Felagsskapurin heldur, at tað eigur at bera til at fáa dómin ógildaðan. Tað kann hava við sær, at Hajara Ibrahim skal fáa hundrað koyrlasløg ístaðin fyri deyðarevsing. Men fyribils stendur deyðarevsingin við.

Dauda hevur eisini verið í rættinum, men hann bleiv fríkendur, tí hann segði seg vera ósekan. Tær strongu muslimsku sharia-lógirnar siga, at skal ein maður dømast fyri kynsligt lógarbrot, skulu vitni hava verið hjástødd. Soleiðis er ikki, tá kvinnurnar koma fyri rættin. Eru tær við barn, eru tær sekar, skrivar AP.



Móttøka

Í sambandi við at Maersk Air gevst at flúgva á føroyaleiðini, og nýtt samstarv byrjar við Atlantic Airways, verður almenn móttøka í hangarinum hjá Atlantic Airways, leygardagin tann 30. oktober í tíðarskeiðnum kl. 09.30–11.00.

Øll, ið koma eru við í lutakastinum um flogferðir.

Handilskjarnin I Niels Finsensgøta 8
FO-100 Tórshavn I Tel 35 74 74 I Fax 35 74 75

MAERSK AIR
– fly as you like



BJARTI MOHR
Tórshavn, fyrst og fremst
- ein góð kommuna fyri øll
XA
FÓLKAFLOKKURIN

NÝGGIR VINNUMØGULEIKAR !

*Gevur altjóða skipaskráseting nýggjar vinnumøguleikar?*

Føroya Sjómansskúli skipar fyri
RÁÐSTEVNU
um **altjóða skipaskráseting** fríggjadagin 29. oktober.

*Skrá:*
Hans J. á Brúgv, sjómansskúlastjóri býður vælkomin.

*Innlegg:* Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiski- og sjóvinnumálum.
Jan Frits Hansen, undirstjóri í Danmarks Rederiforening.
Óli Hans H. Olsen, stjóri á skipaeftirlitinum.
Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum.
Kristin Rasmussen, sjómansskúlalærari.

Endað verður við orðaskifti.
Ráðstevnan byrjar kl. 10:00 og er liðug uml. kl. 15:00.

*Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum í skránni.*

Føroya Sjómansskúli
Maritime College

